# Mentanarpolitikkur í desember

**SJÓNARMIÐ**
*Martin Næs*



### Kringvarp

Árið byrjaði sum eitt mentanarpolitiskt ólægi við tíðindum um, at frá fyrsta januar 2005 vórðu Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya løgd saman í stovnin Kringvarp Føroya. Annar stjórin fór, hin helt, at avbjóðingin var stór. Orsøkin til, at hesir báðir stovnarnir nú vórðu lagdir saman, segðist vera tann, at nú hóskaðu teir nógv betur saman, nógv betur enn teir høvdu gjørt øll hini árini síðan 1984, tá ið Sjónvarp Føroya varð sett á stovn sum sjálvstøðugur stovnur. Spennandi verður at síggja ta nýggju kringvarpslógina, ið, sum fráboðað skuldi ligið klár um 14 dagar.

### Tjóðpallur

Sama dag sum hetta inntrivið verður gjørt í føroyskan mentanarpolitikk, verður ein annar mentanarstovnur settur á stovn, einsamallur og heilt fyri seg, men undir sama ráði og sama ráðharra – við egnari lóg, egnum stjóra og einum sløði av peningi, Tjóðpallur Føroya. Her var eingin slingur í valsinum. Mitt í hesum samanleggingartíðum verður enn ein nýggjur stovnur altso settur á stovn, og hann skal, eftir øllum at døma, partú, vera fyri seg sjálvan og ikki saman við onkrum av teimum verandi, eitt nú onkrum virknum sjónleikarafelag ella Sjónvarpi Føroya, ella kanska nógv best – saman við tí veruliga leikpallinum, Føroya Løgtingi.

### Kringpallur

Nú tá ið árið næstan er liðið, kanst tú ikki lata vera við at hugsa - um tú yvirhøvur hugsar mentanarpolitiskt og eitt sindur yvirskipað - hví alt hetta skuldi henda sama dag, t.e. 1. januar 2005? Var hetta tann bera tilvild? Ella vælvild? Var hetta ein framúr góður leikur? Vóru hetta amatørar sum vóru upp á spæl, ella vóru hetta yrkislærdir leikarar, sum dusaðu sær í stríðnum um at fáa ta mentanarpolitisku kábalina at ganga upp? Tjóðpallin hevur tjóðin grátið eftir síðan fyrst í sjeytiárunum, og honum hava tey flestu av okkum longst eftir nú í mong ár, men vit vildu eisini hava eina virðiliga játtan at fylgja við, og SvF hevði, eftir øllum at døma, spælt fallitt við at hótta við at senda meira danskt tilfar, um teir ikki fingu eina størri játtan. Knappliga høvdu vit ongan sjónvarpsstjóra, hóast hann bæði hevði høli og játtan, men ein tjóðpalsstjóra – sum í roynd og veru hvørki hevði høli ella játtan. Og í dag hava vit eitt Sjónvarp, sum sendir so nógv danskt, at tað nærum hevur yvirhálað sjálvt danska sjónvarpið við donskum sendingum, men hetta verður bara ikki skorið út í papp, víst verður bara til skránna.

### Fólkabókasøvn

14. desember mælti fíggjarnevndarformaður løgtingsins, ósmæðið og óinnpakkað, í tí partinum av Kringvarpi Føroya, sum nú eitur Útvarp Føroya, til, at tað skal verða 'ókeypis' at ferðast um firðir og sund í Føroyum. Hvør vil ikki hava slíka jólagávu?

Á morgni 15. desember samtykti Føroya Løgting broyting í bókasavnslógini frá 2001, sum ger, at teir við fullum rætti kunnu spara heilar 1.7 mill. kr. í útreiðslum til fólkabókasøvnini í landinum næsta ár og øll tey fylgjandi árini. Hesin peningur skal takast frá fólkabókasøvnunum og ikki frá skúlabókasøvnunum, tí Tingið hevur mitt í hesum javnstøðutíðum, nevniliga samtykt, at munur skal gerast á hesum báðum sløgum av bókasøvnum. Skúlabókasøvnini skulu varðveita síni 60% í rakstrarstuðli, meðan fólkabókasøvnini skulu í framtíðini bara fáa 40% í rakstrarstuðli. Hóast mótmæli frá øllum avvarðandi, fer málið ígjøgnum sum um eingi spurnartekin verða sett. Hetta er í roynd og veru fyrsta stigið til avtøku av føroyskum fólkabókasøvnum, tí hvør leggur í at stovnseta og reka fólkabókasøvn og fáa 40% í rakstrarstuðli, tá ið tú kanst stovna skúlabókasøvn og fáa 60% í rakstrarstuðli? Av tí at so nógv av teimum fólkavaldu her hjá okkum (tíverri í hesum føri) eru lærarar, gloymdu tey eina løtu, at skúlabókasøvnini bara tæna lærarum og næmingum, meðan fólkabókasøvnini tæna øllum fólkinum – og hava opið eisini tá ið skúlarnir hava afturlatið.

Hesi tíðindini sá og hoyrdi eg í tí partinum av Kringvarpi Føroya, sum nú eitur Sjónvarp Føroya, nú triðja viðgerð av tingmálinum var til viðgerðar og samtykt, kl. 10.33 í morgun, uttan at nakar tingmaður tók orðið.

Vit hava ikki ráð at rinda fyri raksturin av nøkrum smáum mentanarstovnum á bygd og í bý í okkara egna landi. Hetta eru søvn, sum mong hava verið virkin í meira enn hálvthundrað ár, og sum í dag í mongum førum hava fíggjarætlanir, sum eru so smáar, at eg hugsi at sjálvt ein nútíðar føroyskur slipsaklæddur vinnulívsmaður við ringi í oyranum, og sum bæði hevur fingið reyv og høku, hevði smílst at tølunum í fíggjarætlanini. Rakstrarstuðulin til øll fókabókasøvnini, sum í 2005 er slakar 5 mill. kr. skal lækkast við 1.7 mill. kr. í 2006, sum eitt sparitiltak!!!

### Degns-hús

Samstundis hevur Tórshavnar Býráð her við ársenda ráð at keypa eini gomul sethús í miðbýnum í Havn fyri 5 milliónir kr, eini sethús, sum friðingarnevndin ikki metir hava varðveitingarvirði. Nú kanst tú spyrja, hvat hetta við Degns-húsum hevur við hini málini at gera. Jú, tað hongur soleiðis saman, at hetta, tá ið samanum kemur, alt er mentanarpolitikkur, og hetta er alt mentanarpolitikkur stýrdur meira og minni av vælsignilsi Føroya Javnaðarfloks bæði á Løgtingi, í Býráðnum og hvar aðrastaðni, ið leitað verður. Hetta er so asosialt, at eg fái ilt langt inn í mína sosialu samvitsku. Hvat hugsar Føroya Javnaðarflokkur? Hvar er visiónin?

Politiski myndugleikin
Politikkararnir lata ikki munnin upp í dag uttan at tosa um ´altjóðagerð og ´heimssamfelag´, teir fara við sjógv á baki til norðurlendsku grannar okkara og suður til ES at kanna møguleikarnar at fáa granskingarstuðul og annan stuðul, samstundis verður sagt, at vit sjálv ikki eiga sýru í vegg. Alt skal knúskast av berari asosialari smáligheit. Vit tosa um 1.7 millión krónur til 16 fólkabókasøvn í árinum 2006 eftir Kristi føðing. 16 fólkabókasøvn, sum hava opið fyri almenninginum í tilsamans 200 tímar um vikuna.

### Barnagarður

Á morgni 16. desember veit Útvarpið at siga, at Føroya Landsstýri fer, løgið nokk, at lata nett 1.7 mill. kr. til at endurbyggja ein barnagarð á Sri Lanka, sum skal hýsa 14 børnum. Hetta er uttan iva eitt gott og tiltrongt tiltak, men tá ið peningurin skal takast úr tí sama kassanum, sum í gjár var skralltómur, so má hetta vera stuldur, lygn ella tað, ið verri er, sum vartað verður upp við. Eg fái als ikki samanhang í hetta, men her er kanska eingin samanhangur, tí var tað tað, so hevði óivað mangt sæð øðrvísi út.

Hevði útvarpsmaðurin verið kringur í luftini henda morgunin, so hevði hann loftað hesum við teimum einumkommasjeymilliónunum. Hetta kundi í hvussu er verið ein av yvirskriftunum, sum man kundi heft seg við í desember.

Einakommasjeymilliónirherogeinakommasjeymilliónirder.

### Undirstriking

Til tess at eg ikki skal takast í tí, at eg ikki unni Tjóðpalli Føroya og Barnagarðinum á Sri Lanka tey oyruni, ið játtað verða teimum, vil eg taka fram her, at sjálvandi taki eg undir við, at bæði Tjóðpallur Føroya og Barnagarðurin á Sri Lanka fáa tann neyðuga peningin, hetta skal bara gerast, uttan at fara inn og samstundis taka peningin frá øðrum, eitt nú føroyskum mentanarstovnum, sum frammanundan skríða í skræðuni. Politiski myndugleikin skal bara kalla ein spaka fyri ein spaka, so fáa vit samanhang í viðurskiftini, og so eru vit vónandi greiðari um støðuna, tá ið krossurin skal setast næstu ferð.

### Ring rás

Eg eri bangin fyri, at hetta verður alt ein hvørvisjón í 2015. Helst fari eg skeivur, tí sambært fólkaræðisliga myndugleikanum veit hesin, hvat hann ger. Fólkið átti at staðið sum kánus. Men gakk. Ring rás.

# Býráðið tekur í egnan barm

**Jógvan Arge**
*varaborgarstjóri*

Tórshavnar Býráð hevur samtykt nýggja reglugerð fyri mannagongdir í sínum egnu byggimálum. Í hesi reglugerð verður strammað upp í mannagongdunum til tess at koma burtur úr óhepnari gongd og úrslitum, tá bygt verður til kommunal endamál.

Ein høvuðsbroyting í mannagongdini er, at sjálvt býráðið kemur inn í málini nógv fyrr enn áður. Longu tá ein býráðsnevnd vísir á tørv á eini bygging til eitthvørt endamál, skal málið leggjast fyri býráðið til samtyktar, áðrenn farast kann víðari við tilrættalegging.

Onnur høvuðsbroyting er, at tekur býráðið undir, verður beinanvegin vald ein bygginevnd við fimm limum, tá ætlanin verður mett at kosta 20 mió kr ella meir.

Býráðið sjálvt velur tveir býráðslimir í bygginevndina og borgarstjórin tilnevnir tríggjar, sum skula umboða miðfyrisitingina (fíggjarligt innlit), teknisku fyrisitingina (tekniskt og byggifrøðilig innlit) og ta fyrisitingina, sum ætlar at byggja (fakligt innlit).

Verður byggingin mett at fara at kosta minni enn 20 mió krónur, tilnevnir borgarstjórin teir tríggjar umsitingarligu limirnar eftir sama leisti, og býráðið sjálvt kann velja ein av sínum limum í nevndina.

Bygginevndin skal javnan kunna borgarstjóran og kommunustjóran um gongdina í verkætlanini

Setningurin hjá bygginevndini er at stíla fyri byggingini, at ráðgeva býráðnum og nevndunum og hava ábyrgd av, at verkætlanin verður framd í samsvari við politisku krøvini/ynskini og innanfyri givnar karmar.

Seinastu árini hevur ikki verið vanligt, at býráðið sjálvt hevur verið umboðað í bygginevndum.

Endamálið við at seta býráðslimir í bygginevndirnar er eitt nú at tryggja, at politiska leiðslan er so nær



verkætlanunum, at óhepnar gongdir kunna loftast í tøkum tíma.

Nýggja reglugerðin er einmælt samtykt í býráðnum.

Stórar byggingar fyri framman

Fleiri stórar kommunalar byggiætlanir eru fyri framman. Summar hava verið á borðinum í fleiri ár, men eru ikki settar í verk. Nú kann illa bíðast longur.

Talan er eitt nú um víðkan og nýtíðargerð av skúlanum á Argjum og nýbygging av einum stórum skúla í Hoyvík at taka móti børnunum úr teimum nýggju býarpørtunum har uppi.

Býráðið valdi longu á síðsta fundi sínar limir í ta fyrstu bygginevndina, sum er bygginevnbdin fyri fimleikahallarbyggingini í Gundadali, har Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen fara at umboða býráðið.

Býráðið hevur samtykt at bjóða hetta arbeiði út í heildararbeiðstøku millum eini fimm byggifeløg - trý føroysk og tvey útlendsk - til tess at fáa besta boðið upp á sjálva byggingina og kostnaðin.

Í fimleikahøllini skal verður høll til amboðsfimleik og fleiri gólv til rytmiskan fimleik. Høllin skal byggjast soleiðis, at suðursíðan samstundis kann vera áskoðarapláss við norðurendan á Tórsvølli.

Fimleikarunum hevur leingi vantað góðar umstøður. Býráðið hevur ásannað, at feløgini eru ikki før fyri at lyfta hesa uppgávuna sjálvi, og tí tekur kommunan byggingina upp á seg til frama fyri hesa fólkaítrótt hjá børnum, tilkomnum og eldri.